# Velbastað og Kirkjubø nýggjan brandbil

*Myndir: Hans David Hansen*



*Bilurin hevur innbygt sløkkiagrigat og 100 litra vatntanga.*

Tórshavnar Kommuna hevur keypt ein spildurnýggjan Toyota Hiluxe brandbil til bygdirnar vestan fyri - Velbastað og Kirkjubø.

Bilurin er keyptur frá Reyni Service og uppbygdur á Brandstøðini í Havn. Tað er Kristján Eiriksson, brandmaður, sum hevur staðið fyri arbeiðinum, sum er gjørt saman við Heina Østerø, sum er innsatsleiðari hjá sløkkiliðnum við ábyrgd av bygdunum Velbastað og Kirkjubø.

Bilurin er ein Toyota Hilux 4x4 við 3,0 litra dieselmotori við 170 hk, dupultari kabinu og last. Síðan er ein toppur bygdur omaná lastina við innbygdum sløkkiagrigati og 100 litra vatntanga. Sløkkiagrigatið er ein bensinmotorur við trykkspulara, sum eisini kann nýtast við skúmi. Roykkavaraútgerð er eisini í bilinum.

**mg**




*Toyota Hiluxe brandbilur til bygdirnar Velbastað og Kirkjubø*



*Kristján Eiriksson og Heini Østerø hava bygt bilin um til brandbil*

# Chevrolet Volt – elbilur við 150 hk



*Chevrolet Volt innan*



*Chevrolet Volt hevur 150 hk el-motor við snúningsmomenti upp á 370 Nm*

General Motors presenteraðu produktiónsútgávuna av elbilinum Chevrolet Volt í Evropa á bilaframsýningini Paris Motor Show í oktober.

Chevrolet Volt er ein fimm persóna sedan við fýra hurðum. Bilurin hevur 150 hk el-motor við snúningsmomenti upp á 370 Nm, sum svarar til ein 2,0 litra dieselmotor.

Chevrolet Volt skal framleiðast á eini General Motors verksmiðju í Detroit frá 2010, og kemur til Evropa sum Opel Volt í 2011, sigur Erik Morsing, sum er tíðindastjóri hjá General Motors í Danmark.

**mg**